## TEKNISKUR SØLURÁÐGEVI

Til teknisku deild okkara
verður søkt eftir søluráðgeva




*Royndir okkara tey seinastu 60 árini, hava gjørt okkum til ein tann størsta HVS heildarveitara í Føroyum. Vit bjóða fram heildarloysnir innan hitaverk, vatn, sanitet, ventilatión, kloakk og baðirúmsmøblar*

**Tað setur krøv til starvsfólkið**

Tú kemur at ráðgeva kundum okkara og hjálpa teimum at finna tað røttu loysnina. Tú kemur at rokna út tilboð, og verða við til at fyrireika størri verkætlanir og fylgja teimum í verki.

Samstundis fært tú ábyrgd og ávirkan á at menna fyritøkuna.
Tú kemur soleiðis, í samstarvi við onnur, at virka á einum spennandi og fjøltáttaðum arbeiðsplássi.

**Tað er ein fyrimunur um tú**

- Hevur røttu útbúgving og/ella drúgvar royndir
- Hevur royndir innan vhs, ventilation ella líknandi
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Ert fyrikomandi, nærlagdur, íðin, og kreativur
- Skilur týdningin av at góðum handverki, dygd og góðari kundarøkt

**Afturfyri bjóða vit**

- At tú fært eitt spennandi starv við nógvum møguleikum
- At tú fært góðar samstarvsfelagar í góðum fakligum arbeiðsumhvørvi
- Ávirkan á tín egna arbeiðsdag
- Løn, í samsvarar við tín førleika
- Stutt sagt, eitt spennandi starv í einari fyritøku í støðugari menning

Sosialurin 341800

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja tel. 312 000
og tosa við Kristian á Dul, stjóra.

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum,
skal verða innkomin seinast 15. august til:

**Maria Poulsen pf**

Smyrilsvegur 8 · 100 Tórshavn · Tel 31 20 00 · www.mariapoulsen.fo


## *Brúðarmyndir*



*Hjartaliga takka vit øllum sum mintust okkum á hjúnabandsdegnum tann 23. juli.*

**Ynskja Rannvá og Rasmus.**




Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høga tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.

Fyri at betra um tænastustøðið hevur Almannastovan framt bygnaðarbroytingar, har fleiri tænastur eru lagdar út á økini, soleiðis at viðskiftafólk og stovnar fáa lættari atgongd til tænasturnar. Høvuðsuppgávan hjá økisdeildunum er at geva almenninginum ráð og vegleiðing um rættindi sambært almannalóggávuni eins og at taka avgerðir.

Á deildini í Tórshavn eru 16 starvsfólk.

# Sosialráðgevi

Á deildini hjá Almannastovuni í Tórshavn er eitt starv sum avloysari fyri sosialráðgeva í farloyvi lýst at søkja. Starvið er ætlað at vera frá 1. september 2005 til 31. mai 2006.

Tann, ið verður settur, verður partur av einum stovni, sum alla tíðina má tillaga seg broytingunum í samfelagnum og taka við avbjóðingunum, sum liggja í tíðini og í framtíðini.

Okkara ynski er, at tú ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og arbeiðir sjálvstøðugt við at loysa uppgávurnar í tráð við endamálið hjá stovninum og teir málsetningar, stovnurin hevur.

Starvið umfatar í høvuðheitum ráðgeving og vegleiðing av borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar, íverksetan av fyriskipanum og annað.

Vit søkja eftir einum fólki við sosialráðgevaútbúgving. Tað er eitt fyrimunur, um tú hevur royndir innan almenna umsiting, góðan teldufórleika í brúkarastøði, kunnleika til skrásetingararbeiði og góðan førleika í føroyskum.

Starvið verður sett og lønt sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 5.

Nærri upplýsingar um starvið fást við at venda sær til Eyðvør Mortensen, deildarleiðara á telefon 353570.

Skrivlig umsókn skal vera Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 22. august 2005.

Send umsóknina til:
Almannastovuna
Smyrilsveg 20
Postboks 3096
110 Tórshavn

almannastovan

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo